# til tey næstu



Trygvi Jóhanson (vinstrumegin) og Poul Henning Jacobsen til arbeiðis í kuldanum týsdagin. - Hetta má ein bara taka við, tá ein hevur valt eitt slíkt arbeiði í Føroyum!

*Eg havi eitt gott grundøki við sera góðum útsýni*
*(Poul Henning Jacobsen, Syðrugøta)*

*Áðrenn jól vóru nógvir keðiligir dagar við regni og vindi. Tá var eitt sindur óinteressant at arbeiða úti*
*(Trygvi Jóhanson, timburmaður, Leirvík)*

*Arbeiðini hava fyri tað mesta verið her í økinum - Leirvík og Gøtu, og so havi eg eisini verið úti á Toftum og í Runavík og arbeitt*
*(Trygvi Jóhanson, timburmaður, Leirvík)*



*ið hesi sethúsini í Syðrugøtu, liggja fleiri*



*Poul Henning hevur sjálvur stoypt húsini. Tá hann er heima millum túrarnar, nýtir hann ein stóran part av frítíðini í nýggja heimi sínum í Syðrugøtu*

## - Eitt gott grundøki

**- Eg vóni at kunna flyta inn seint í summar, sigur eigarmaðurin, Poul Henning Jacobsen**

SETHÚS
*Snorri Brend*

**Syðrugøta:** - Eg havi eitt gott grundøki við sera góðum útsýni, sigur Poul Henning.

Hinvegin so er rættiliga vindhart í hesum økinum, men Poul Henning hevur tikið hyggjuráð fyri hesum og hevur stoypt tey allan vegin upp.

- Tey eru sterkt bygd, so tí skuldu vindurin ikki gjørt nakað, slær hann fast.

Her við Gerðaveg eru sethúsini hjá Poul Henningi als ikki tey einastu, haðani ein hoyrir hamarsløgini gella. Ikki færri enn fýra onnur eru í gerð í løtuni!

- Eg gleði meg at flyta inn, sigur hann og brosar.

Tað er altíð trupult at siga ein prís fyri eini slík sethús.

- Alt kostar í dag, og tað vísir seg at tað sjáldan heldur. Men eg ætlaði at sleppa nakað undir 2 mió krónur, sigur spenti húsaeigarin.

### Nógv tíð

Sethúsini hjá Poul Henningi eru 120 fermetrar til støddar í niðaru hæddini, meðan loftið er nakað minni, einar 75 fermetrar.

Trý kømur eru á loftinum og eitt niðriundir. Umframt hetta er stórt bilhús uttanfyri.

Poul Henning er sjálvur ættaður higani úr Syðrugøtu, men býr nú í Saltangará.

Hann siglur sum maskinmeistari umborð á Finni Fríða, og hevur fasta skipan, so at hann altíð veit, nær hann er heima.

- Tá eg eri heima millum túrarnar, fer ein rættiliga stórur partur av tíðini til húsini, sigur hann.